

# AÐALSTJÓRI TIL FISKIMÁLARÁÐIÐ

Aðalstjórin verður ovasti ráðgevi hjá landsstýrismanninum í fiskivinnumálum og fer at hava ábyrgdina av dagligu leiðsluni, menningini og rakstrinum av Fiskimálaráðnum. Økið fevnir um: fiskivinnumál, fiskirannsóknir, fiskiveiðueftirlit og bjarging, hvalamál, inntøkutrygd og lønjavning, sjóvinnumál, tilbúgving og brunamál.

Broytingar eru seinastu tíðina gjørdar í Fiskimálaráðnum og fleiri eru í umbúna. Deildir og arbeiðsuppgávur verða umskipaðar, soleiðis at greiður skilnaður fæst millum stjórnaruppgávur og málsavgreiðslu. Endamálið er at stytta um svartíðirnar og geva viðskiftafólkunum eina betri tænastu.

**Høvuðsuppgávur**

- Leiða og samskipa arbeiðið í ráðnum
- Samskipa og fyrireika uppgávur í omanfyri nevndu málum
- Fyrireika lógir, kunngerðir og reglugerðir innan virkisøkið
- Eftirlit við stovnum undir Fiskimálaráðnum
- Aðrar viðkomandi uppgávur, sum hoyra virkisøkinum til

**Almenn førleikakrøv**

Sett verður sum krav, at umsøkjarin hevur útbúgving frá lærdum háskúla og leiðsluroyndir frá tí almenna ella privata arbeiðsmarknaðinum ella útbúgving og royndir, ið kunnu javnsetast við hesi. Umráðandi er, at tann, ið verður settur, hevur evni at seta í verk fyriskipanir, hevur nútíðar leiðslueginleikar, innlit í politisk viðurskifti og vitan um tær treytir, ið eru galdandi í eini politiskari fyrisiting. Dentur verður lagdur á persónligar eginleikar so sum evni at eggja og menna leiðarar og starvsfólk, góð samstarvsevni, vilja til at royna nýggj virkisøki og áhuga í avbjóðingum.

**Setanarviðurskifti**

Starvið er tænastumannastarv, starvsheitið er aðalstjóri og er flokkað í 39. lønarflokki. Harumframt er ein mánaðarlig viðbót uppá 4.375,28 kr. Viðbótin er ikki eftirlønargevandi. Setanarøkið fevnir um Fiskimálaráðið, stovnar undir tí, Løgmansskrivstovuna og hini stjórnarráðini. Tænastustaðurin í løtuni er Fiskimálaráðið.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til Marjuna Hanusardóttur, løgmansstjóra, tlf. 35 10 10.

Umsóknir við upplýsingum um útbúgving, royndir og møgulig viðmæli skulu stílast til løgmann, og sendast Løgmansskrivstovuni, Marjuni Hanusardóttur, løgmansstjóra, postsmoga 64, 110 Tórshavn, í seinasta lagi 2. januar 2006. Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

www.fisk.fo

VIT DRAGA EINA LÍNU - VIT SETA SKYNSEMI Í HÁSÆTI - VIT VILJA VITA - VIT BRÓTA SLÓÐ

*Fiskimálaráðið er eitt av sjey stjórnarráðum í miðfyrisitingini, sum veitir landsstýrinum ráð, tryggjar haldgott grundarlag og ger hugskot til veruleika. Landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum umsitur málsøkini fiskivinna, sjóvinna og tilbúgving. Fiskimálaráðið vegleiðir landsstýrismannin, soleiðis at avgerðirnar eru rættar og haldgóðar. Ráðið fyrireikar lógir, kunngerðir og reglugerðir, og hevur eisini eftirlit við, at ásettar reglur verða fylgdar. Somuleiðis røkir ráðið samskipandi uppgávur innan málsøkið hjá landsstýrismanninum, og tekur lut í millumlanda samráðingum, altjóða fiskiveiði- og sjóvinnufelagsskapum umframt norðurlendskum samstarvi.*

## Starvslýsingar




á portal.fo

**Kostnaður:** (um lýsingin eisini er í Sosialinum)

| | |
|---|---|
| 1 vika | kr. 500,- |
| 2 vikur | kr. 750,- |
| til freistin at søkja er úti: | kr. 1.000,- |

**Kostnaður:** (um lýsingin ikki er í Sosialinum)

| | |
|---|---|
| 1 vika | kr. 750,- |
| 2 vikur | kr. 1.000,- |
| til freistin at søkja er úti: | kr. 1.250,- |

**2 lýsingar = -20% í avsláttri**
**3 ella fleiri = -30% í avsláttri**

## STANLEY Gávubúðin

**LANGUR LEYGARDAGUR**
**10. desember**
**Opið til kl. 17.00**

**Leikur - 10%**
**Gávur - 10%**
**Búnýti - 10%**

**Útsøla jólaprýði**
**-50%**
**av útsøluprísinum**

***Jólamaðurin vitjar kl. 13.00***

**STANLEY**
Tel 42 22 70 · 460 Norðskála

**Internet Sosialurin**

## Til sølu

**VW Caravelle 2.5**



Árg. 11.02.2000 · 4 x 4 · DIESEL · 10 prs. · Leður setur
Navigatión (GPS) · Klima autm. · Oljufýring o.m.a. ·
Í sera góðum standi
***Einans kr. 250.000,-***

LANDSINS LAGALIGASTA BRÚKTBILAFÍGGING
**Bilfríðkan á Hjalla**
TEL 21 73 00
sí meira á WWW.BILFRIDKAN.FO

Sosialurin 341800

## TILBOÐ

**FORD SIERRA 1.8 diesel**

Til sølu fyri ***kr. 8.000,-***

LANDSINS LAGALIGASTA BRÚKTBILAFÍGGING
**Bilfríðkan á Hjalla**
TEL 21 73 00
sí meira á WWW.BILFRIDKAN.FO

Sosialurin 341800